## Fælles anmodning

Lagmanden og statsministeren er enige om at aktivere nævnet i henhold til lov om Færøernes hjemmestyre (herefter ”hjemmestyreloven”) § 6, stk. 2, for at afgøre følgende spørgsmål:

”Er færøsk medlemskab i eget navn i World Trade Organization (WTO) foreneligt med Færøernes forfatningsmæssige status?”

I denne forbindelse er lagmanden og statsministeren enige om:

1. Lagmanden og statsministeren underretter, i koordination, Højesterets præsident om de to medlemmer, der er valgt til nævnet af henholdsvis landsstyret og regeringen, sammen med en kort levnedsbeskrivelse.

2. Højesterets præsident meddeler lagmanden og statsministeren, hvilke tre højesteretsdommere han har udpeget til nævnet, og hvem af dem der er udpeget til formand.

3. Såfremt et medlem valgt af landsstyret, et medlem valgt af regeringen eller en højesteretsdommer fratræder, afgår ved døden eller af andre grunde må udtræde af nævnet, skal et andet medlem udpeges efter de regler, som gjaldt for den person, der er fratrådt.

4. Formanden leder arbejdet i nævnet og foranlediger, at nævnet får de oplysninger, som det finder nødvendigt.

## Felags áheitan

Løgmaður og forsætisráðharrin eru samd um at virkna nevndina, sambært lóg um heimastýri Føroya (eftir hetta heimastýris-lógin) § 6, stk. 2, at taka støðu til fylgjandi spurning:

“Er limaskapur Føroya í egnum navni í World Trade Organization (WTO) sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya?”

Í hesum sambandi eru løgmaður og forsætisráðharrin samd um:

1. Løgmaður og forsætisráðharrin boða samskipað hægstarættarforsetanum frá, hvørjar tveir limir ávikavist landsstýrið og stjórnin hava valt í nevndina, saman við stuttari ævilýsing.

2. Hægstirættarforsetin boðar løgmanni og forsætisráðharranum frá, hvørjar tríggjar hægstarættardómarar hann hevur sett í nevndina, og hvønn teirra hann hevur tilnevnt sum formann.

3. Um so er, at ein limur, valdur av landsstýrinum, ein limur, valdur av stjórnini, ella ein hægstarættardómari, fer frá, doyr ella av øðrum grundum má fara úr nevndini, skal ein annar limur veljast eftir teim reglum, sum vóru galdandi fyri tann limin, sum fór frá.

4. Formaðurin leiðir arbeiðið í nevndini og skipar so fyri, at nevndin fær tær upplýsingar, nevndin hevur fyri neyðini.

| | |
|---|---|
| 5. Møder i nævnet afholdes skiftevis i Tórshavn og København, medmindre formanden finder, at praktiske forhold gør det nødvendigt at fravige dette. | 5. Nevndarfundirnir vera aðruhvørja ferð hildnir í Tórshavn og Keypmannahavn, uttan so er, at nevndarformaðurin metir, at praktisk viðurskifti gera, at neyðugt er at víkja frá hesum. |
| 6. De af landsstyret og regeringen valgte medlemmer samt de tre højesteretsdommere deltager i alle nævnets møder. | 6. Limirnir valdir av landsstýrinum og stjórnini og teir tríggir hægstarættardómarnir luttaka á øllum fundum nevndarinnar. |
| 7. Nævnets møder er ikke offentlige. | 7. Nevndarfundirnir eru ikki almennir. |
| 8. For hvert møde i nævnet føres der protokol. | 8. Fyri hvønn nevndarfund verður skrivað gerðabók. |
| 9. Ved sagsbehandlingens slutning voteres der først mellem de af landsstyret og regeringen valgte medlemmer. | 9. Tá ið málsviðgerðin er at enda, verður fyrst atkvøðugreiðsla millum teir landsstýris- og stjórnarvaldu limirnar. |
| 10. Samtidig med voteringen indleverer de af landsstyret og regeringen valgte medlemmer på skrift affattede præmisser for deres votering enten selv eller i fællesskab med andre valgte medlemmer. | 10. Samstundis við atkvøðugreiðsluni lata nevndarlimirnir, valdir av landsstýrinum og stjórnini, skrivliga orðaðaðar úrskurðargrundir fyri síni atkvøðugreiðslu, annaðhvørt sjálvir ella í felag við øðrum nevndarlimum. |
| 11. Er de af landsstyret og regeringen valgte medlemmer enige, er dette nævnets endelige afgørelse, jf. hjemmestyrelovens § 6, stk. 2. | 11. Eru teir landsstýris- og stjórnarvaldu limirnir samdir, er hetta endaliga avgerð nevndarinnar, sbrt. heimastýrislógini § 6, stk. 2. |
| 12. Er de af landsstyret og regeringen valgte medlemmer ikke enige, voterer højesteretsdommerne i nævnet, og sagen afgøres af de tre højesteretsdommere, jf. hjemmestyrelovens § 6, stk. 2. | 12. Eru teir landsstýris- og stjórnarvaldu limirnir ikki samdir, atkvøða hægstarættardómararnir í nevndini, og málið verður avgjørt av teimum trimum hægstarættardómarunum, sbrt. heima-stýrislógini § 6, stk. 2. |
| 13. Nævnets afgørelse og begrundelse offentliggøres snarest, efter afgørelsen er truffet, i en færøsk og en dansk sprogversion. Begge sprogversioner anses for autentiske. Konkrete oplysninger kan undtages, hvis særlige grunde taler herfor, f.eks. af hensyn til offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter | 13. Avgerð og grundgevingar nevndarinnar verða almannakunngjørdar sum skjótast, eftir at avgerðin er tikin, orðað á føroyskum og donskum. Báðar orðingarnar vera at rokna sum upprunaligar. Ítøkiligir upplýsingar kunnu undantakast, um serligar grundir tala fyri tí, t.d. við atliti |

| | |
|---|---|
| forholdets særlige karakter er påkrævet.<br><br>14. Formanden udpeger og leder nævnets sekretariat.<br><br>15. Landskassen og statskassen bærer udgifterne til honorar, rejseudgifter og forplejning for de af dem udpegede medlemmer.<br><br>16. Landsstyret og regeringen er enige om, at nævnets afgørelse er endelig og ikke kan indbringes for domstolene. Afgørelsen er således bindende for landsstyret og regeringen.<br><br>København, den 10. januar 2025<br><br>Mette Frederiksen<br>Statsminister | til almenn áhugamál, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja upplýsingin.<br><br>14. Formaðurin tilnevnir og stendur á odda fyri skrivstovuhaldi nevndarinnar.<br><br>15. Landskassin og statskassin bera útreiðslurnar av ómaksløn, ferðaútreiðslum og vistarhaldi fyri teir av teimum settu limunum.<br><br>16. Landsstýrið og stjórnin eru samd um at nevndarinnar avgerð er endalig og ikki kann skjótast inn fyri dómstólarnar. Sostatt er avgerðin bindandi fyri landsstýrið og stjórnina.<br><br>Keypmannahavn, hin 10. januar 2025<br><br>Aksel V. Johannesen<br>Løgmaður |